# Týsk rás ger innslag um Føroyar

**Í hesum døgum er ein týskur sjónvarpsmaður í Føroyum og ger eitt innslag um Føroyar og nakrar føroyskar landsliðsleikarar til sjónvarpsrásina ZDF. Endamálið er at geva týskarunum eitt innlit í, hvør tað er, sum teirra fótbóltslandslið skal møta í landsdysti mikudagin 16. oktober**

LANDSLIÐSFÓTBÓLTUR
*Solby A. Eliasen*



*Týski sjónvarpsmaðurin Jochen Bouhs hevur verið í Føroyum í nakrar dagar fyri at gera eitt innslag um Føroyar og føroyskan landsliðsfótbólt til týsku sjónvarpsrásina ZDF*

Týski sjónvarpsmaðurin Jochen Bouhs frá týsku sjónvarpsrásini ZDF kom til Føroyar fríggjadagin. Hann var í Klaksvík og hugdi at seinasta dystinum í føroysku landskappingini í millum KÍ og NSÍ. Og so helt hann saman við NSÍarunum leygarkvøldið og var til silvurveitslu í Runavík.

Hesar dagarnar, hann hevur verið her, hevur hann fylgt við landliðsleikar-unum Jákup á Borg og Hjalgrím Elttør í teirra dagliga starvi. Henda dagin skal hann eisini hitta Jens Martin Knudsen í Runavíkar Kommunuskúla.

Hann sigur, at við at fylgja landsliðsleikarunum í teirra størvum, kann hann vísa hyggjarunum, at føroysku landsliðsleikararnir, sum hava fingið fleiri flott úrslit í altjóða fótbóti, noyðast at hava arbeiði við síðuna av fótbóltinum.

– Og nú vit eru her í Runavík, fari eg sjálvandi eisini at nýta høvi til at tosa við hjálparvenjaran Jógvan Martin Olsen, sigur týski sjónvarpsmaðurin.

Innslagið, sum verður sýnt á ZDF seinnapartin sunnudagin, kemur at vara umleið 10 minuttir. Tað verður sýnt sunnudagin, tí at tað er dagin eftir dystin millum Litava og Føroyar og tríggjar dagar, áðrenn dystin móti Týsklandi.

– Føroyar eru eitt avbera vakurt og grønt land. Her hevur regnað eitt sindur allatíðina, meðan eg havi verið her. Men eg kann ímynda mær, at tað kann regna meira, sigur hann og leggur aftur at, at hann ringdi til konuna heima í Týsklandi sunnudagin og segði við hana, at tey áttu at komið til Føroyar í feriu næsta summar einaferð, tá Týskland og Føroyar skulu leika landsdyst her.

– Kanska ikki í fýra vikur, men tvær, skoytir hann skemtandi uppí. Hann heldur, at ein fær ov lítið burtur úr nøkrum fáum døgum. Tá hugsar hann um, at ein so at siga bert sær meginøkið.

Hann sigur, at hann bleiv sera bilsin av, at fleiri av føroyingunum, sum hann hevur hitt, kenna sjónvarpsrásina ZDF, sum hann arbeiðir fyri.

– Tað kemur óivað av, at so nógvar parabolantennur eru í Føroyum, heldur hann.

### Samstarv við SvF

Hann hevur fólk frá Sjónvarpi Føroya at hjálpa sær. Kamera – og ljóðfólkini Bjørg Mohr Anderssen og Hallur Thomsen.

Tá Sosialurin hitti hann, var hann staddur á Fiskamarknaði Føroya á Toftum, har tey skuldu taka myndir av bátum, sum landaðu har.

– Tað er fyri at geva hyggjarunum hjá okkum eina mynd av vinnulívinum her í Føroyum. Í gjár vóru vit millum annað á Eiði og í Gjógv, og eisini nýttu vit høvi at vitja eina smoltstøð. Við hesum vil eg vísa, at føroyingar leggja stóran dent á at menna tykkara fiskivinnu ístaðin fyri bert at fiska og harvið møguliga tøma allar grunnarar, greiðir Jochen Bouhs frá.

Hann sigur, at hann hevur sett seg í samband við sjónvarpsrásir, sum vísa landsdystin millum Týskland og Føroyar fyri at vita, um tað er møguligt at seta kostnaðin á rættindunum til dystin niður.

– Tað geri eg, tí eg havi fingið nógva og góða hjálp frá mínum føroysku starvsfeløgum í SvF. Men tað er alt á samráðingarstøði enn, og eg havi onki frætt aftur sum er úr Týsklandi.

Hann heldur fram, at hann í sínum royndum hevur sett seg í samband við aðrar týskar sjónvarpsrásir, sum ZDF deila rættindini til landsdystin við, og heitt á fólk har, sum hann kennir at virka fyri, at minka kostnaðin, so dysturin kann verða vístur í SvF. So verður tað spennandi at vita, um tað fer at eydnast honum.

Annars veit Jochen Bouhs ikki so nógv um føroyskan landsliðsfótbólt, tí enn hevur hann ikki sæð tað føroyska landsliðið leikt.

Men hann sigur, at hann fer at síggja landsdystin millum Føroyar og Skotland á sjónbandi, tá hann kemur aftur til Týskland. Og fer hann tá eisini at síggja landsdystin móti Litava, sum verður sýndur í týskum sjónvarpi.

– Tá eg havi sæð teir dystirnar, fari eg at kunna gera onkrar viðmerkingar til landsliðið sum heild, sum eg so kann eisini kann nýta til innslagið sunnudagin.

Tá vit byrja at práta um sjálvan dystin móti Týsklandi, og um hvat eitt møguligt úrslit kann fara at verða, er hann ógvuliga varin við at siga nakað, hóast lítil ivi man vera um, hvør fer at vinna tann dystin.

– Alt kann henda í fótbólti – tað hava tykkara landsliðsleikarar prógvað fleiri ferðir. Spyr bara skotarnar og eysturríkarar, sigur Jochen Boyhs at enda. Hann fer heimaftur til Týsklands í morgin.

# Fram II seldur til Namibia

**Fyrr í vikuni varð frystitrolarin Fram II seldur einum felag í Namibia**

SKIPASØLA
*Eirikur Lindenskov*




*Frystitrolarin, Fram II, er nú seldur til Namibia, har hann skal fiska rossamakrel og onnur fiskasløg*

Seinastu góðu tvey árini hevur Fram II ligið upplagdur í Klaksvík. Skipið varð bygt í 1975 og er knappar 60 metrar til longdar.

Tað er skipsmeklaravirkið Maretec á Argjum, sum nú endiliga skipaði fyri søluni av skipinum vegna P/F Sea Freeze, ið er ein partur av JFK-Seafood í Klaksvík. Ætlanin hjá nýggja eigaranum er at gera nakrar ábøtur á skipið, áðrenn siglt verður tann langa túrin til Namibia, sum væntandi kemur at taka einar 3-4 vikur.

Skipið skal fiska rossamakrel og onnur fiskasløg í Namibia og møguliga eisini í Angola.

JFK-Seafood keypti upprunaliga Fram II og frystitrolarin Pelagos úr Vestmanna vegna veiðuloyvini. Avgjørt varð síðani at selja hesi bæði skipini, og MARETEC skipaði tá eisini fyri søluni av Pelagos, sum varð seldur til Mauritius fyri tveimum árum síðani.



# »Langelinie« stoypt upp í hædd

**Atløgusíðan fer at gera tað høgligari hjá Snodd at landa skipini**

ATLØGUSÍÐA
*Vilmund Jacobsen*



*»Langelinie« er ikki long, men hon er tað, hon er*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í nøkur ár hevur ein lítil partur av kantinum fram við havnalagnum beint norðanfyri ferjuleguna við Toftagjógv verið stoyptur upp til vatnlinjuna. Hesin kantur hevur tó ikki verið nýtiligur hjá skipum og bátum, tí hann hevur ligið so lágt í sjónum.

Økið norður ímóti bryggjuni, har Fiskavirking á Toftum, er, er stórt og asfalterað, men her er eingin atløgusíða.

Nú hevur Nes kommuna so stoypt tann partin upp í vanliga bryggjuhædd, sum hevur ligið í vatnskorpuni. Kommunan bjóðaði hetta arbeiði, sum ikki er serliga umfatandi, út, og tað er felagið, J & K. Petersen, sum hevur planerað og stoypt. Tað tók bert fáar dagar.

Samlaða atløgusíðan norður úr ferjuleguni er nú einar 25 metrar til longdar.

### Høgligari hjá Snodd

Sum skilst, er eitt av málunum við nýggju atløgusíðuni at gera tað høgligari hjá P/F Snodd, sum eigur nýggja virkið beint norðanfyri, at landa skipini. Tað er ikki langur teinur frá virkinum og suður á Fiskamarknaðin, men tá ið ein heil fiskalast skal koyrast norður, verður nógv koyring tilsamans.

Nú kunnu skip liggja úr krókinum við ferjuleguna og norðureftir, men treytin er, at Ternan II ikki nýtir rampan, meðan skipið liggur.

Fyri Nes kommunu er – kanska – tað keðiliga hent, at nú siglir Ternan II bara ein túr tíðliga um morgunin og so næsta túr aftur um 14-tíðina seinnapartin. Seinasti túrur verður so sigldur longur út á seinnapartin. Áður sigldi hon tveir túrar um morgunin og síðan ikki aftur fyrr enn langt út á seinnapartin. Nú siglir hon mitt á degi og kemur tí at órógva virksemið við nýggju atløgusíðuna.

Ternan II tekur ikki bilar og farm; tí hevði tað verið ein stórur bati, um hon nýtti landgangin, tá ið hon leggur at heldur enn rampan, tí tá kundi hon ligið longur úti á pierinum og ikki inni í molakrókinum, har skipini, sum landa til Snodd, ætlandi skulu liggja.

Toftamenn eru hittinorðaðir, og longu nú sigst, at onkur hevur »doypt« nýggju atløgusíðuna, »Langelinie«. Hon er ikki long, og tað er kanska júst tí, hon hevur fingið hetta heiti…

# At skilja fisk við hond ella maskinu

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*




*Á Kollafjord Pelagic skiltu tey sildina frá makrelinum við hond, men sum skilst, verður arbeitt við at fáa hetta arbeiði gjørt við skiljimaskinu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hendan dagin, Sosialurin var á tíðindafundi og framvísing á Kollafjord Pelagic í síðstu viku, hevði skip verið við makreli. Væl av sild var uppi í makrelinum, og á virkinum stóðu fólk og skiltu sildina burtur úr við hond. Hetta sá eitt sindur undarligt út á einum so framkomnum virki, sum er bygt til at skilja, frysta og pakka 1000 tons um samdøgnið.

Nú er tað ikki altíð, at so stórur íblandingur er av øðrum fiski, men tað er vist, at skal eitt slikt virki arbeiða 1000 tons um samdøgnið, fáast hesi tonsini ikki ígjøgnum, um skilt verður við hond.

Á virkinum fingu vit tó at vita, at arbeitt verður við at loysa henda spurningin, soleiðis at meginparturin av íblandingini verður skildur frá við skiljimaskinum.

Meðan vit sóu hetta snotuliga og framkoma virki, kom eg at hugsa um fyrsta túrin við svartkjaftaskipinum, Andriasi í Hvannasundi. Vit royndu suðuri við St. Kilda. Nógvur svartkjaftur var at fáa, men nógvur gullaksur var uppi í veiðini. Millum høvuðspavnarnar har afturi og teir fremru pavnarnar, har skildur fiskur skuldi verið í, stóðu fleiri mans og skiltu gullaksin burtur úr. Hann fór út í pumpurnar og aftur í havið…

Nú var alt nýtt umborð á Andriasi í Hvannasundi tá, men linja var til gullaks, og sum vit skiltu, var gullaksur dýrari fiskur tá enn svartkjafturin. Harumframt var gullaksurin nógv størri og kundi tískil givið størri úrtøku.

Trupult var at skilja, hví soleiðis varð farið fram. Tað var eisini trupult at skilja, hví skiljimaskinan ikki syrgdi fyri hesi skiljing heldur enn ein partur av manningini.

Hugsaði tá við mær, at heldur áttu teir mans, sum stóðu og skiltu gullaksin aftur í havið, at staðið við skerilinjuna og fingið hann til høldar.

Á vitjanin í Kollafirði kom eg at hugsa um hesa tíðina.

Eingin samanburður skal tó gerast, tí øll kunnu vit fegnast um, at vit nú hava eitt virkið við stórari orku til at skilja, frysta og pakka pelagiskan fisk til matna.

Kundi tó hugsað mær, at skiljingin er ein rættiliga stórur og avgerandi partur í eini framleiðslu – ein partur, sum kann avgera, um lítið ella nógv fæst ígjøgnum.

Vit hava álit á teimum, sum standa á odda fyri hesi stóru verkætlan, og vit vóna, at hon verður til gagns fyri nótaskipini og alt samfelagið.